| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 03. februar 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 02/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 03. februar kl. 19.00 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 31. januar 2014 um innkalling til fundar.

**Møttir vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Árant Berjastein
Birgir Petersen
Símun Jákup Eliassen
Harley Joensen

Sigga Óladóttir Joensen á lista D, Sigurð S. Simonsen og Eyðun á Lakjuni á lista B møttu ikki á fundinum vegna ógjegni í máli nr. 04/2014, sum er einasta mál á dagskránni. Fyri Sigurð S. Simonsen møtti varalimurin Símun Jákup Eliassen og fyri Eyðun á Lakjuni møtti varalimurin Harley Joensen Annar varalimuri á lista B Elibert Kerá kundi ikki møta vegna forfall.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 04/2014.**

**Umsókn frá P/F Pelagos undir stovnan um byggiloyvi til uppisjóvarmatvøruvirki.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Pelagos undir stovnan, dagfest 29. januar 2014 um prinsippielt byggiloyvi saman við ávegis tekningumar um bygging av uppisjóvarvirkið á Enninum í Fuglafirði.

Samb. støðuplani verður bygningurin staðsettur sunnanfyri bygningin hjá Bergfrost niðanfyri tangaøkið.

Endamálið við havnabyggingini og planering av økinum sunnanfyri Bergfrost, frammanfyri tangaøki, er gjør,t fyri at geva pláss fyri nýggjum uppisjóvarvirkið.

Tá ið hetta virkið er sera plásskrevjandi og ikki hevur tørv á arbeiðsøki millum kajsíðu og virkið, verður mælt til av vinnunevndini og teknisku nevndini at prinsippielt byggiloyvi verður givið til hesa verkætlan, sambært fyriliggjandi staðseting og tekningum, tó soleiðis at fráleikin frá Bergfrostbygninginum vegna brunakrøv verður 5.00 metrar.

Samráðingar verða tiknar upp við Havsbrún um regulering av verandi tangaøki soleiðis at farvegurin omanfyri virkið verður nøktandi.

Bygningurin skal verða settur í samráð við teknisku deild, og arbeiðið annars skal verða gjørt í tøttum samstarvi við Teknisku deild, vinnunevndina og havnameistaran.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá vinnunevndini og teknisku nevndini um at geva P/F Pelagos prinsipployvi til bygging av uppisjóvarmatvøruvirki á økinum sunnan fyri bygningin hjá Bergfrostniðan fyri tangaøkið. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari ikki á fundi vegna ógjegni.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.20

Magnus S. Midjord

Dánjal Vang

Petur Abrahamsen

Árant Berjastein

Birgir Petersen

Símun Jákup Eliassen

Harley Joensen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen